Búskapur og vinna:

Stóra lønarhækking

Ein kanning vísir, at stjórnarnir í teimum norsku peningastovnunum fingu munandi størri lønarvøkstur í fjør enn tey vanligu starvsfólkini í teimum somu peningastovnunum.

Kanningin sigur, at lønirnar hjá starvsfólkunum vuksu í meðal umleið 5 prosent, men at lønirnar hjá stjórunum vuksu umleið 15 prosent í meðal.

Stjórarnir halda tó ikki, at nakað órímiligt er í hesum. Flestu teirra halda, at lønirnar hjá stjórunum eru bert lagaðar til tíðina, og so vísa teir á, at flestu peningastovnarnir høvdu eitt gott úrslit í fjør, og at leiðslan so hevur fingið eina hóskandi samsýning.

Reiðarí fekk bót

Eystari landsrættur í Danmark hevur gjørt av, at almenna reiðaríið Scandlines skal rinda 17 milliónir krónur í bót, tí felagið hevur misnýtt sína kappingarstøðu í Eystrasalti. Kanningar hjá bakmansløgregluni have avdúkað, at almenna jarnbreytarfelagið DSB, sum fyrr átti Scandlines, kravdi serligt gjald frá øðrum reiðarium, men ikki frá sínum egna reiðarií. Bakmansløgreglan arbeiðir við tveimum málum afturat, sum viðvíkja Scandlines.

Fyribyrgja Enron

Figgjarmálaráðharrarnir í ES-londunum hava sett sær fyri at herða eftirlitið við grannskoðarum og serfrøðingum fyri at sleppa undan einari Enron-gølu í Evropa. Endamálið er, at tað skal verða lættari hjá íleggjarum og øðrum at útvega sær álítandi upplýsingar.

Um grannskoðararnar siga figgjarmálaráðharrarnir, at tað er neyðugt at tryggja, at grannskoðararnir eru óheftir av vinnulívinum. Sum eru hava grannskoðararnir í teimum flestu londunum eitt slag av sjálvseftirliti, men í framtíðini skulu teir undir alment eftirlit, eins og skipanin longu er í summum londum.

UTTAN ÚR HEIMI

Eingin vil lurta eftir Powell

Tíðindafólk, sum hava verið á Vestara Áarbakka, siga, at oyðileggingarnar eftir ísraelska átakið eru stórar. Hendan myndin er úr Jenin

Mynd: Reuter

Higartil hevur amerikanski uttanríkisráðharrin, Colin Powell, ikki fingið stórvegis burtur úr friðarferð síni í Miðeystri. Og eitt uppskot um ein Miðeystur-toppfund vinnur neyvan frama.

MIÐEYSTUR
Árni Joensen

Sunnudagin varð í spenningi bíðað eftir, hvat fór at koma burtur úr fundinum millum amerikanska uttanríkisráðharran, Colin Powell, og palestinska leiðaran, Yasser Arafat, men aftan á tann tríggjar tímar langa fundin var semja um, at lítið og einki var komið burturúr.

Sjálvur segði Powell, at fundurin hevði verið gagnligur, men hann ásannaði samstundis, at enn var langt á mál til eina vápnahvíld. Arafat segði einki, tí hann hættaði sær ikki útum at tosa við tíðindafólkini, tí hann kendi seg ikki tryggan uttan fyri dyrnar.

Leygardagin kravdi Powell, at Ísrael skuldi taka seg aftur av Vestara Áarbakka, men tí sýtti Ariel Sharon, forsætisráðharri fyri. Arafat sigur, at hann fer ikki at kunngera vápnahvíld, fyrr enn teir ísraelsku hermenninir eru tiknir aftur.

Samstundis krevur Sharon, at teir palestinsku myndugleikarnir skulu flýggja Ísrael menninar, sum beindu fyri ísraelska ráðharranum Zeevi í oktober í fjør, men tað vil Arafat ikki.

Ísraelskir fjølmiðlar eru á einum máli um, at teir báðir partarnir hava læst seg fastar, og fjølmiðlarnir fýlast á, at Powell ikki hevði eitt uppskot til eina politiska loysn við sær, tá hann fór úr Washington. ùrslitið er, siga fjølmiðlarnir, at hvørgin av pørtunum vil lurta eftir amerikanska uttanríkisráðharranum.

Ariel Sharon hevur skotið upp, at USA skal skipa fyri einum Miðeystur-toppfundi í Washington. Sambært uppskotinum skulu leiðararnir í Jordan, Egyptalandi, Marokko, Saudiarabia og teimum smáu londunum við Persaflógvin luttaka á fundinum saman við Sharon sjálvum. USA skal leiða samráðingarnar.

Yasser Arafat skal hava tikið undir við uppskotinum um ein toppfund í USA, men tað er ein stórur spurningur, um Arfat yvirhøvur sleppur á fundin. Sharon hevur fyrr skotið upp at halda tílíkan fund, og ta ferðina ætlaði hann ikki, at Arafat skuldi sita við samáðingarborðið. Sigur hann tað sama nú, er lítið hugsandi, at teir arabisku leiðararnir fara til Washington, tí teir vilja ikki samráðast uttan um palestinska leiðaran.

Danir velja hava evruna

Men stjórnin hevur ongar ætlanir um fólkaatkvøðu um nýtt gjaldoyra

DANMARK
Árni Joensen

Hevði fólkaatkvøða verið í Danmark nú um at setta evruna í gildi ístaðin fyri krónuna, hevði svarið verið eitt greitt ja.

Ein meiningakanning, sum stovnurin PLS hevur gjørt fyri Jyllandspostin, vísir, at 56 av teimum spurdu eru fyri at seta felags evropeiska gjaldyrað í gildi. 36 prosent eru ímóti, og hini átta prosentini ivast, hvat er tað rætta.

Sama kanning vísir, ar 88 prosent av teimum spurdu vænta, at evran fyrr ella einni kemur ístaðin fyri krónuna.

Danski Evropa-ráðharrin Bertel Haarder fegnast um, at so nógvir danir taka undir við evruni, men hann leggur dent á, at stjórnin hevur ongar ætlanir um at lata fólkið taka støðu til spurningin. Hann sigur, at tað fara at ganga ár, áðrenn fólkaatkvøða verður um málið.

Tað er heldur einki at siga til, at stjórnin er varin. Tann 28. september í 2000 var fólkaatkvøða í Danmark um evruna. Úrslitið varð, at 53,1 prosent atkvøddu ímóti at seta hana í gildi, hóast ein stórur meiriluti í Fólkatinginum hevði mælt fólki til at atkvøða ja.

Úr Norðurlondum:

Ja til ES

Hevði fólkaatkvøða verið í Noregi nú, høvdu 54 prosent av teimum norsku veljarunum atkvott fyri, at Noreg skal fara upp í ES. Tað sæst í einari nýggjari meiningakanning, sum blaðið Aftenposten hevur gjørt.

46 prosent siga, at tey høvdu atkvott ímóti.

Eisini hendan kanningin vísir, at norðmenn leggja rættiliga stóran dent á, hvat íslendingar fara at gera. 44 prosent av teimum spurdu siga, at ein íslendsk umsókn um ES-limaskap eigur at skunda undir norskan limaskap. Millum teirra, sum eru fyri norskum ES-limaskapi, siga 66 prosent, at støðan Íslands hevur stóran týdning, meðan 23 prosent av teimum, sum siga nei, siga, at ein umsókn úr Reykjavík hevur týdning fyri teirra støðutakan.

Kann vera dýrt

Eins og í Føroyum eru tað nógvir danir, sum velja at smíða sjálvir heldur enn at senda boð eftir einum útlærdum timburmanni, men ein dómur í síðstu viku vísir, at tað kann koma aftur um brekku.

Í hesum førinum hevði ein maður smíðað sær eini summarhús, sum hann seinni seldi fyri 985.000 krónur. Tað vísti seg kortini, at tann fyrri eigarin ella smiðurin hevði ikki nýtt tað tilfar, sum ásett er, og at ymisk brek vóru við húsunum. Keyparin stevndi við kravi um endurgjald, og í síðstu viku avgjørdi Vestari landsrættur, at tann fyrri eigarin skal rinda keyparanum 400.000 krónur í endurgjaldi. Men tað er ikki alt. Hann skal eisini rinda 180.000 krónur fyri sakarmálskostnað og metingar av summarhúsinum ella næstan 60 prosent av tí, sum hann í sínari tíð fekk fyri húsið.

Danskir sakførarar siga, at dómurin kann fáa stóran týdning, tí tann óhepni seljarin er ikki tann einasti, sum hevur roynt seg sum húsasmið.

Hoyggjturkari



- Turkar 20' kontainara við vátum grasi uppá uml. 6-8 tímar
- Bíligur í rakstri uml. kr. 20,- um tíman írokna streym og dieselolju
- Tú kanst turka gras í oysandi regni fyri umleið kr. 20,- um tíman
- Kvalitetur og long livitíð
- Royndir í Føroyum við sera góðum úrsliti

Seinasta freist at bíleggja fyri at náa levering til slátturin í ár er innan 01.05.02

Kaj Andreasen & Co
Heilsøla, smásøla & umbo - Tel. 315600 - Fax 318008

PÁSKATILBOÐ Í ELDING! PÁSKATILBOÐ Í ELDING! PÁSKATILBOÐ

SUPERTILBOÐ

SKUNDA TÆR OG GER KVETTIÐ - AVMARKAÐ NØGD!

Roland
FANTOM SYNTHESIZER
FANTOM • 72 tangentar Workstation • 1024 nýggj ljóð + 29 trummusett • Kann útbyggjast v/ expansion board
• Vanl. prísur: 28990,-
21790,00
BÍLIGARI ENN Í DANMARK!!

Roland
KREATIVT KEYBOARD
EM-15 • 226 ljóð • 64 rýtmur
• Vanl. prísur: 3990,-
3590,00
Spar 400,-

Roland
KREATIVT KEYBOARD
EM-25 • 226 ljóð • 64 rýtmur • Diskladrev
• Vanl. prísur: 5440,-
4890,00
Spar 550,-

ELDING
SMS - Tel 319697 • Saltangará - Tel 449697 • Klaksvík - Tel 479697

Til sølu

VOLVO F12 6x2 trekkjari, árg. 1/84
VOLVO F10 6x2 við fastari last og HIAB 190 krana
SCANIA P82 6x2 við fastari last v/ gardinum, árg. 4/84
VOLVO F12 8x2 við weirheis, árg. 1/85
10 stk. 20 fót bingjur

P/F Heri Thomsen
FO–510 Gøta
tlf. 441047 ella 211047

Teir lovaða 2 fólkaatkvøður áðrenn 1. stig varð tikið á loysingarleið

Nú hevur **tú** møguleikan at svara teimum 30. apríl

rik I

JAVNAÐARVEITSLA

Um nóg stórur áhugi er, verður skipað fyri veitslu fyri javnaðaráhugaðum í Suðuroy. Veitslan verður hildin í Gistingarhúsinum í Øravík leygarkvøldið 20. apríl kl. 19.30.

Orkestrið "Trio" spælir til dans eftir borðhaldið

Kostnaður fyri borðhald og dans er kr. 150 fyri hvønn

Seinasta freist at melda seg til er onsdagin 17. apríl. Tekningarlistar eru á
tlf. 37 33 96 í Vági
37 12 08 á Tvøroyri
37 51 61 í Hvalba

Javnaðarfeløgini í Suðuroy

HKJ Contractor

Vit átaka okkum alt innan timburarbeiði.

Vit átaka okkum eisini at gera tilboð.

Leynar
tlf. 211774

Eysturoyar Teoriskúli

Um nóg nógv tekna seg, verður endurtøkuskei
19. og 20. apríl
Endalig roynd verður
29. apríl

Johan Beder, tel. 210 821
Ole Lykke, tel. 220 972
Hugo Kristiansen, tel. 225 225

Sosialurin - 316290